

# TVÆR STJØRNUR ÚR Fame

Felags fyri Dánjal Guðjónson og Edith Dahl Jakobsen er, at tey røkja hvør sín høvuðsleiklut í sangleikinum "Fame". Edith er 19 ára gomul og er næmingur í Studentaskúlanum í Hoydølum. Dánjal er 17 ára gamal, og ætlar at nema sær kunnleika innan tónleik í framtíðini. Planet hitti tey bæði, beint undan einari sýning. Vit prátaðu um sangleikir, list, dreymar og framtíðina.

SAMRØÐA
**Rókur Jákupsson**
rokur@sosialurin.fo

### Hví við í Fame

***Dánjal*** – eg varð uppringdur, og spurdur um eg hevði hug at vera við í leikinum. Og tað vildi eg sjálvandi, tí tílíkt hevur altíð havt mín áhuga. Eg havi júst verið í eitt ár á einum tónleikaskúla í Danmark, har ið vit m.a. hava arbeitt við songleikum. Og mær dámar væl at arbeiða við hesi sjangruni. Tískil valdi eg at fara til upptøkuroyndina. Og har gekk tað bara væl.

***Edith*** – Eg ivaðist onga løtu, tá ið eg hoyrdi at skúlin fór at seta ein sangleik upp. Hetta er veruliga nakað fyri meg. Mær dámar so væl at syngja og spæla sjónleik, so hetta var bara perfekt fyri meg.

### Hvussu er ein upptøkuroynd?

***Edith*** – vit vóru býtt í tríggjar bólkar. Vit vóru umleið 20 í hvørjum bólki. Fyrst skuldu vit inn til Jákup Weihe og Mikkjal Helmsdal, har ið vit skuldu ígjøgnum eina sjónleikararoynd. Har gjørdu vit ymiskar venjingar, sum vístu um sjónleikur lá inni í okkum. Aftaná tað skuldu vit inn til eina dansiroynd sum Jóna Thomsen stóð fyri. Hon hevði gjørt eina koreografi, sum vit øll skuldi læra. Og at enda skuldu vit inn til eina sangroynd sum Sigrid Sivertsen og Hans Oliver Hansen stóðu fyri.

### Minnast tit yvirhøvur tíðina, tá ið Fame var í hásætinum í 80´unum?

***Edith*** – Eg minnist, at eg sum barn dámdi at hyggja eftir sjónvarpsrøðini. Man kennir temalagið og teir kendu sangirnar. Men eg haldi ikki at nakar av okkum visti heilt, hvat ið leikurin snúði seg um, tá ið vit fóru undir venjingarnar. Summi vistu slett ikki, hvat ið Fame var fyri nakað.

***Dánjal*** – Jú, eg kendi eitt sindur til tað, tí at eg havi gingið á tónleikaskúla. Seinasta hálva árið gjørdu vit rættiliga nógv við sangleikir, har eg m.a. spældi við einum sangleiki sum eitur "Sidste Chance". Eisini var eg við til at skriva tónleikin til ein nýggjan sangleik. Tá ið ein arbeiðir við songleikum, lurtar man eisini eitt sindur eftir øðrum songleikum. Soleiðis havi eg hoyrt Fame.